**Bárður á Lakjuni**
**Beinir Johannesen**
**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
**Grímur Sundstein**
**Jacob Vestergaard**
**Jørgen Niclasen**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar (Avskrivingarlógin)**
(Broyting í avskriving av leiguíbúðum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2001 verður í § 17, stk. 1, litra b "bygningar til útleiging við minst 10 íbúðum" broytt til: "bygningar til útleiging við minst 3 íbúðum".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Almennar viðmerkingar

Vit hava eitt stórt bústaðartrot í Føroyum. Stóri trupulleikin er, at útboðið ikki hevur megnað at fylgt við fólkavøkstrinum.

Politiska skipanin má gera átøk, ið kunnu virka fyri, at útboðið av bústøðum verður størri. Hetta uppskotið er ein liður í tí.

Bygningar, ið verða nýttir til leigubústaðir, kunnu avskrivast eftir serligum reglum, ið eru nágreinaðar í § 20 í avskrivingarlógini.

Treytin fyri, at tú kanst avskriva eftir hesum reglum, er, at tað er talan um minst 10 leigubústaðir. Hetta kann hava vansar við sær.

Fyri tað fyrsta, so er tað ein stór íløga at gera 10 leigubústaðir. Tað krevur nógvan kapital, og tað er ein størri váði í tílíkari verkætlan.

Eisini eru 10 leigubústaðir krevjandi, tá tað snýr seg um lendi. Tað er avmarkað, hvussu nógv byggilendi er í fleiri bygdum og býum, og eisini er tað avmarkað, hvussu stórum øki byggjast kann á.

Tí verður skotið upp, at talið á 10 leigubústøðum verður lækkað til 3 leigubústaðir.

Hetta ger, at tað eru fleiri, ið kunnu taka lut í arbeiðinum at økja um útboðið av bústøðum. Við at broyta, hvussu avskrivast kann eftir serligum reglum, so gerst tað betur møguligt hjá smærri og miðalstórum fyritøkum at gera leigubústaðir.

Tað er ikki líka krevjandi fíggjarliga at gera 3 leigubústaðir, sum tað er at gera 10. Váðin er eisini minni, og tí letur hetta upp fyri, at tað verða alsamt fleiri, ið síggja seg før fyri at fara í holt við at byggja bústaðir. Tað er eisini gott fyri kappingina og tískil til fyrimunar fyri leigaran, tá samanum kemur.

Eisini krevur tað minni lendi at byggja smærri eindir, og tað kann geva størri og fjølbroyttari møguleikar fyri bústaðarbygging.

Fyri at taka samanum, so gevur hetta uppskotið:

- betri møguleikar at økja um útboðið av bústøðum
- betri møguleikar hjá smærri og miðalstórum fyritøkum at vera við til at økja um útboðið
- møguleikar fyri smærri og fjølbroyttari bústøðum
- meir kapping, ið er til fyrimunar fyri leigaran

## Avleiðingarnar av uppskotinum

Uppskotið kann hava nakað av fíggjarligum avleiðingum fyri landskassan, men er tað torført at meta um. Hinvegin, so kann tað hava við sær, at útboðið av bústøðum fer at vaksa.

Tað er ivasamt, um uppskotið hevur nakrar umsitingarligar avleiðingar av týdningi.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Talið 10 verður broytt til 3, tá umræður leigubústaðir, ið kunnu avskrivast eftir serligum reglum.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 4. november 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Lakjuni | Beinir Johannesen | Grímur Sundstein |
| Jacob Vestergaard | Jørgen Niclasen | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur |